# Sumbiar Kommuna

## Samandráttur av fundarsamtykt kommunustýrisfundur 13.09.2010

| | |
|---|---|
| Mál nr. 1/8<br><br>Støðutakan til tilboð frá PB-Consult at gera spillvatnsætlan í allari kommununi og uppmáting til vatnleiðing í Sumba | Til nr. 1<br><br>Biðja PB-Consult og Munin koma við einum nýggjum tilboðið fyri pkt. 2 – 6 og biðja Munin um at gera pkt. 1 eftir tímarokning (væntandi 1 dag til kr. 7.500,00) |
| Mál nr. 2/8<br><br>Umsókn frá Faroe Farming um loyvi at asfaltera á havnaøkinum í Ónavík | Til nr. 2<br><br>Samtykt var at geva loyvi til at asfaltera økið sum teir biðja um, ella stoypa økið, tað sum teir meta vera fragast. |
| Mál nr. 3/8<br><br>Umsókn frá Ólavur Jákup Krossteig, um byggiloyvi | Til nr. 3<br><br>Samtykt var at geva byggiloyvi samb. umsókini. |
| Mál nr. 4/8<br><br>Umsókn frá Torra Thomsen um loyvi at keypa ½ av trappunum við Lítlá | Til nr. 4<br><br>Samtykt var ikki at geva loyvi eftir verandi tekning. Garagan má standa 3 metrar frá vegnum, og má hon ikki koma nærri vegnum enn sethúsini. |
| Mál nr. 5/8<br><br>IRF, felags umhvørvispláss í Suðuroy | Til nr. 5<br><br>Samtykt var at senda IRF eitt skriv, hvar sagt verður at kommunan ikki tekur undir við at hava eitt felags bingjupláss fyri alla Suðuroynna. |
| Mál nr. 6/8<br><br>Lending Víkarbyrgi | Til nr. 6<br><br>Samtykt var at flyta kr. 50.000,00 frá játtanini til Pollin til lendingina í Víkarbyrgi (1. Viðgerð) |
| Mál nr. 7/8<br><br>Ellisheim Tvøroyri | Til nr. 7<br><br>Samtykt at senda eitt skriv til stýrið fyri Ellisheimið á Tvøroyri, hvar vit mótmæla ætlanini til sparingarnar á Ellisheiminum. |
| Mál nr. 8/8<br><br>Parkeringsøki á Gørðum | Til nr. 8<br><br>Kannað málið við at seta parkeringsforboð á báðum síðum. |
| Mál nr. 9/8<br><br>Broyting byggisamtykt fyri matr. Nr. 230 í Sumba | Til nr. 9<br><br>Málið útsett |
| Ymiskt:<br><br>Hjallurin á Leiti | Samtykt var at skifta takið á hjallinum, treytað av at Gardar Joensen og Árni Nielsen gera arbeiðið við at skifta takið, sum gjald fyri at nýta hjallin. |